# Nú ráða kvinnurnar fyri borgum í Vági

**Á nýggjárinum fáa vágbingar kvinnuligan borgarstjóra fyri fyrstu ferð í søguni. Og varaborgarstjórin verður eisini kvinna. Fremsta endamálið hjá nýggju samgonguni verður at fáa gongd á aftur vinnulívið í Vági**



*Nýggi borgarstjórin í Vági, Kirstin Strøm Bech, við bygdini frammanfyri sær hendan fyrsta kavadagin í ár. Fremsta raðfestingin hjá nýggju býráðssamgongunií Vági verður at fáa vinnulívið aftur á føtur*

*Myndina tók Dagfinn Olsen*

BÝRÁÐSSAMGONGA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nýggjársdagur 2005 verður ein søguligur dagur í Vágs Kommunu. Tá fáa vágbingar sín fyrsta kvinnuliga borgarstjóra í søguni.

Og sum um tað ikki var nóg mikið, so verður varaborgarstjórin í Vági eisini ein kvinna.

Hóskvøldið samdust uttanflokkalistin, javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin at skipa samgongu í Vági.

Og tey eru samd um at Kirstin Strøm Bech úr javnaðarflokkinum skal verða borgarstjóri í nýggja býráðnum í Vági og at Ásgerð Stenberg úr sambandsflokkinum skal verða varaborgarstjóri.

Sostatt verða tað kvinnurnar, sum fara at mynda ovastu leiðsluna í Vági tey komandu fýra árini og tað er ikki hent fyrr í Vági.

### Vinnulívið aftur á føtur

Nýggja samgongan hevur skrivað eitt samgonguskjal við nøkrum høvuðspunktum í, sum hon ætlar at arbeiða við. Men talan er um eitt yvirskipað skjal, har tey ikki fara í smálutir við tí, tey ætla sær at fremja.

Samgongan fer hesa næstu tíðina at útgreina nærri innanhýsis, hvussu tey ymsu endamálini í samgonguskjalinum skulu røkkast.

### Arbeiði á flakavirkið

Men komandi borgarstjórin í Vági, dylir ikki fyri, at nýggja býráðið fer at raðfesta tað allarfremst at fáa gongd á aftur vinnulívið í Vági, sum er í djúpari kreppu.

Í hesum samabndi hevur stóra flakavirkið hjá fiskavirking mangan verið nevnt sum ein ræðumynd av vinnulívinum í Vági.

Fiskavirking eigur tað, men tað hevur staðið tomt í fleiri ár og allar royndir at lata tað uppaftur við varandi arbeiði, eru miseydnaðar.

Nýggja býráðssamgongan hevur eisini leyðsliga umrøtt flakavirkið og tey vilja nú hava eina frágreiðing frá Føroya Fiskavirking.

– Vit vilja hava at vita frá Føroya fiskavirking, um álvari er í ætlanum teirra um at lata tað uppaftur.

Og tað skilst eisini, at fær býráðið ikki eina nøktandi frágreiðing frá Fiskavirking, verður málið tikið uppaftur.

Og gongur heilt galið við flakavirkinum, útihýsir Kirstin Strøm Bech ikki møguleikanum fyri, at býráðið fer at krevja av Fiskavirking, at virkið verður selt, so at onkur annar kann fáa møguleikan at lata tað uppaftur – ella at Fiskavirking tekur virkið niður og fer avstað við tí, so at grundstykkið, sum kommunan eigur, kann brúkast til okkurt annað endamál.

Nýggja býráðsamgongan fer eisini at virka fyri at fáa fleiri almenn arbeiðsplás til bygdina.

### Ikki samanlegging, men samstarv

Nýggja samgongan hevur ikki tosað um at leggja kommunurnar í Suðuroy saman. Men ætlanin er avgjørt at taka samband upp við hinar kommunurnar um nærri samstarv á nógvum økjum.

Eitt nú heldur býráðssamgongan í Vági, at tað er burturvið, at kommunurnar í oynni skulu senda so nógv arbeiðspláss og so nógvan pening norðureftir í samband við serkøna hjálp av ymsum slagi, bæði til grannskoðarar, løgfrøðingar, verkfrøðingar og arkitektar.

– Vit halda, at tað hevði verið rættari, at allar kommunurnar í oynni tóku seg saman um at fáa ymsar felags tænastur í oynna, tí her er í hvussu so er talan um nøkur arbeiðspláss, sum óneyðugt verða flutt av oynni, sigur Kirstin Strøm Bech.

Nýggja samgongan í Vági kundi hugsað sær, at samstarva við hinar kommunurnar um at fingið fyritøkur í oynna, sum við løgfrøðingum, grannskoðara og verkfrøðingini í Suð-uroynna, sum kommunurnar kundu brúkt og verið grundarlagið undir, men sum so eisini kundu gjørt arbeiði fyri onnur.

Hon heldur eisini, at kommunurnar kundu samstarva um eina felags barnavernd.

### Bólturin hjá landsstýrinum

Eitt stórt mál í Vági seinastu tíðina hevur verið ætlanin hjá landsstýrinum at flyta ætlaða miðnámsskúlan í Vági til Hovs og at byggja hann í ein skúladepil har, saman við heilsuskúlanum. Afturfyri skal so røktarheim til 35 fólk byggjast í Vági.

Hetta var eitt mál, sum fráfarandi býráð avgjørt vísti frá sær. Men hvørja støðu hevur nýggja býráðið til hetta mál?

– Vit standa við tað avgerð, sum undanfarna býráð hevur tikið. Men vit eru eisini samd um, at bólturin liggur hjá landsstýrinum. Og spælir landsstýrið bóltin yvir til okkum við nøkrum heilt ítøkiligum, eru vit sinnað at viðgera tað og at taka støðu til tað útspælið, sigur Kirstin Strøm Bech.

– Men fyrrenn eitt møguligt útspæl kemur frá landsstýrinum, gera vit ikki meiri við málið, leggur komandi borgarstjórin afturat.

### Arbeiðssetningur

Annars hevur nýggja býráðssamgongan í Vági sett sær fyri.

– at taka upp samráðingar við hagarnar í Vági um at vetrarfriða býin fyri seyð.

– at tálma ferðsluni í býnum, tí hon er at kalla í ruðuleika.

– at stuðla itróttinum sum mest.

– at fjálga um mentanina.

– at gera umstøðurnar hjá vinnurekandi fiskimonnum og útróðrarmonnum betri.

– at øll størv, sum verða sett í kommununi, skulu lýsast leys, so at øll hava sama møguleika at søkja.

– at opinleiki og gjøgnumskygni skal valda í øllum málum, sum verða viðgjørd í býráðnum.

– at hava nóg mikið av grundstykkjum til fólk, sum vilja seta búgv og at veita teimum, sum

byggja, eina góða tænastu við tekningum og verkfrøði.

– at fáa virksemi á havnalagið á syðra armi áfjørðinum.

– at fáa fleiri almenn arbeiðspláss til Vágs.

Og annars hevur nýggja samgongan í Vági sett sær fyri at standa saman um bygdina og oynna og vera við til at gróðurseta ein spíra til eina blómandi Vágsbygd og eina virkna og áhugaverda Suðuroy, sum tað so skaldsliga stendur í samgonguskjalinum.



# Allahalganna konsert og offurgudstænasta í Vágs kirkju



KONSERT

*Tíðindaskriv*

Sunnudagin, 14. november kl. 18 fer Kirkjukórið Ljómur saman við gentukóri og blásarum úr Suðurættini at hava árligu allahalganna konsertina. Kórið og kirkjan fyltu 65 ár í vár, so talan verður um eina jubileumskonsert. Í tí sambandi syngur kórið 2 sálmar:
"Nógv fagrari, fríari" og »Eitt lið sum mjøll at líta á«, sum vóru sungnir til ta fyrstu konsertina 3. nov. 1940.

Á skránni eru harumframt Kingo í svenskari útseting, klassikarar sum »Prope est Dominus«, »Meine Seel´ ist stille zu Gott«, »O God of Bethel«, Händel og sálmar úr nýggju Kórbókini við
satsum eftir Karl Clausen.
Meðan "Nú hvítna tindar fjøllum á" verður sungin, fer kirkjufólkið, sum siður er, innar í kór at offra til vælgerandi endamál.
Ulf Nordlund stedur á odda fyri blásarunum.

Dorte Tilma stjórnar Kirkjukórinum Ljómi.

# Ógvuslig oljupríslækking stimbrar

OLJUPRÍSUR

Sonn vend er komin í oljuprísgongdina. Síðani hægsta stigið 26. oktobur er oljuprísurin lækkaður 20%, eftir at hann mánaðin frammanundan var hækkaður 26%. Samstundis vóru metnógv arbeiðspláss sett á stovn í USA í oktobur. Sostatt eru tvey viðurskiftir, ið hava forðað lánsbrævarentum at hækka, betraði. Kortini eru hesar rentur ikki hækkaðar, tí javnvág valdar ikki á lánsbræva-marknaðunum. Støðan er ikki varandi, og lánsbrævarentur eiga tí, sum frálíður, at hækka. Nýggjastu búskapartíðindini eru eisini jalig fyri partabrøv. Væntast skal tó framvegis ikki, at føroyska rentustigið hækkar næstu mánaðirnar.

Lesið meira um hetta og onnur viðurskifti á virðisbrævamarknaðunum í viðheftu útgávuni av Útliti og Ráki fyri novembur 2004.

*Kelda: Útlit og Rák, Kaupthing*

# Full semja í Tvøroyrar Býráð

Fyri fyrstu ferð í søguni hevur býráðið á Tvøroyri skipað seg uttan meiri- og minniluta.

Alt býráðið hevur nú undirskrivað eitt virkis- og arbeiðsskjal fyri tey komandi fýra árini, har allir sjey býráðslimir vóru samdir um økini.

Býráðsformaður verður Kristin Michelsen.

Varabýráðsformaður, Pauli Einarsson.

### Nevndirnar vórðu skipaðar soleiðis:

**Fíggjarnevndin:**
Kristin Michelsen, formaður
Sverre Midjord, varaformaður
Jaspur Vang

**Tekniska nevnd:**
Pauli Einarsson, formaður
Jens Johannesen, varaformaður
Bergur Bærendsen

**Havna- og umhvørvisnevnd:**
Jaspur Vang, formaður
Pauli Einarsson, varaformaður
Jens Johannesen

**Mentanarnevnd:**
Sverre Midjord, formaður
Pauli Einarsson,varaformaður
Marjun Olsen

**Sosiala nevnd:**
Jens Johannesen, formaður
Pauli Einarsson, varaformaður
Marjun Olsen

**Vinnunevndin:**
Bergur Bærendsen, formaður
Jens Johannesen, varaformaður
Sverre Midjord

# Vágs Býráð – ábyrgdarbýtið

**Soleiðis hevur nýggja býráðssamgongan býtt ábyrgdarøkini í býráðnum ímillum sín. Her er talan um tær føstu nevndirnar**

**Borgarstjóri:**
Kirstin Strøm Bech

**Varaborgarstjóri:**
Àsgerð Stenberg

**Fíggjarnevndin:**
Kirstin Strøm Bech, forkvinna
Sølvi Andreasen

**Tekniska nevnd:**
Poul Augustinussen, formaður
Eyðfinn Mørk

**Mentanarnevndin:**
Àsgerð Stenberg, forkvinna
Poul Augustinussen

**Havnanevndin**:
Svenning Borg, formaður
Eyðfinn Mørk

**Sosiala nevnd:**
Sølvi Andreasen, formaður
Svenning Borg

Tríggir limir eru í hvørjari nevnd, men tjóðveldisflokkurin í andstøðu eigur triða og seinasta limin í teimum einstøku nevndunum.

### Eitt tíðarskeið er endað

Tað var annars nokk so skjótt eftir at valúrslitið í Vági var kunngjørt, at tað varð greitt, at dagarnar hjá Jógvani Krosslá sum borgarstjóra, vóru taldir.

Uttanflokkalistin, sambandsflokkurin og javnaðarflokkurun funnu rættiliga skjótt saman og longu mikudagin samdust tey um at skipa samgongu. Hóskvøldið hittust tey so aftur at býta málsøkini ímilllum sín og klokkan 22 hóskvøldið, varð avtalan undirskrivað.

Nú Kirstin Strøm Bech setir seg í borgarstjórasessin í Vági á nýggjárinum, kann av sonnum siga, at eitt tíðarskeið í Vágs søgu endar og eitt annað byrjar.

Tí samstundis endar eitt drúgvt og hendingaríkt tíðarskeið við tjóðveldisflokkinum í ovastu leiðsluni í Vágs kommunu.

Tjóðveldisflokkurin hevur havt borgarstjóran í Vági í heili 24 ár, ella eitt lítið mannaminni.

Tjóðveldistíðarskeiðið í Vági byrjaði í 1980, tá ið Tórbjørn Benjardøgg varð borgarstjóri. Í 1988 varð Mannbjørn Tausen valdur til borgarstjóra og hesi seinastu 12 árini síðani 1992, hevur Jógvan Krosslá verið borgarstjóri í Vági.

Meiri um nýggju býráðssamgonguna í Vági á síðu 16.



*Hetta er nýggja býráðssamgongan í Vági. Aftanfyri standa Ásgerð Stenberg, varaborgarstjóri, úr sambandsflokkium vinstrumegin og Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri úr javnaðarflokkinum. Sitandi frá vinstru eru teir Poul Augustinussen á uttanflokkalistanum, Svenning Borg úr sambandsflokkinum, Sølvi Andreasen á uttanflokkalistanum og Eyðfinn Mørk úr javnaðarflokkinum*